# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til eina familju í Runavíkar kommunu, at byrja skjótast gjørligt.

Talan er um eitt stuðulsstarv á 20/30 tímar um vikuna til eina familju. Arbeiðsstaðurin verður heima hjá familjuni. Endamálið við stuðlinum er í samstarvi við barnaverndarnevndina og foreldur at stuðla familjuni í at hava umsorgan fyri børnunum.

Starvið eru tíðaravmarkað til 30.06.2005

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Barnaverndini í seinasta lagi týsdagin 25. januar.

**Barnaverndarnevndin**
Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará

# Sunda kommuna

Sunda bygdarráð hevur á fundi 10. januar 2005 samtykt, at almennu bygdarráðsfundirnir fyri ár 2005 verða hildnir hesar mánadagar kl. 19.00 á kommunuskrivstovuni

| | |
|---|---|
| 10. januar | 22. august |
| 14. februar | 12. september |
| 14. mars | 10. oktober |
| 11. apríl | 14. november |
| 9. mai | 28. november |
| 13. juni | 12. desember |

Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
FO-400 Oyrarbakki
www.sunda.fo

Valhalla

# Rakstrarleiðari
## til fyritøku á Toftum

Søkt verður eftir rakstrarleiðara til fiskavirkið Valhalla P/F á Toftum.

Valhalla P/F er ein fyritøka, har høvuðsvirksemið er framleiðsla og søla av feskari fiskavøru av bestu góðsku. Vøran verður seld í Europa og Stóra Bretlandi.

Valhalla P/F hevur síðani byrjan havt stóran vøkstur og inntøku. Framleiðslan á Toftum liggur um 5.000–6.000 tons um árið. Stórir møguleikar liggja fyri framman; at royna hesir er treytað av, at finna rætta rakstrarleiðaran, sum megnar at ímøtikoma teimum.

Høvuðsuppgávan verður at optimera núverandi framleiðslu. Eftirhondini vil eisini ein stórur partur av arbeiðnum verða samferðsla við fiskibátar, innkeyp á fiskamarknaði og framleiðsla av nýggjum vørum.

Vit vænta av tær, at tú á ein leiðandi hátt í tøttum samstarvi við stjóra og onnur starvsfólk í fyritøkuni kanst tryggja virkinum eina positiva menning. Tað er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert álítandi og megnar at taka ábyrgd.

Vit bjóða eitt starv, sum er áhugavert við atliti til ávirkan, sjálvstøðuga tilrættisleggjan og møguleikar til menning.

Løn eftir førleika. Við tíðini, møguleika fyri at starvast eftir eini bónusskipan

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við møguligum prógvum, royndum og viðmælum skulu vera okkum í hendi innan 28. januar 2005 og sendast til:

**Valhalla P/F**
**FO-650 Toftir**

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til stjóran Peter Vognsen Nørgaard á tlf. 449780.

# Serráðgevi
## á
## Almannastovuni

Eitt fulltíðarstarv sum serráðgevi við tænastu á Barna- og Ungdómsdeildini í Tórshavn er leyst at seta sum skjótast.

**Um deildina**
Á Barna- og Ungdómsdeildini arbeiða 7 fólk. Starvið inniber ferðing um alt landið.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki**
At veita ráð og vegleiðing innan barnaforsorgarøkið, og um stuðulstiltøk innan almannaøkið
At veita ráð og vegleiðing til familjur at børnum við skerdum likamligum og /ella sálarligum førleika.
Vegleiða og ráðgeva barnaverndarnevndum
Viðgera tilmælir um tiltøk smb. barnaforsorgarlógini
Viðgera umsóknir um stuðul og hjálpartiltøk smb. forsorgarlógini

**Útbúgving**
Viðkomandi útbúgving, t.d. sosialráðgevi, námsfrøðingur, lærari, sjúkrarøktarfrøðingur
Ynskiligt er at tú hevur viðkomandi eftirútbúgving.

**Førleikakrøv**
Góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
Góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
Góð samstarvsevni
Evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt

**Lønar- og setanarviðurskiftir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Beintu Festirstein, deildarleiðara tlf. 353510

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Jónas Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn í hendi **innan 27.01.2005.**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin